– Eg kendi meg ongantíð veruliga sjúka kropsliga, men tað var tungt at fara ígjøgnum hetta tíðarskeið sálarliga. Eg stúrdi nógv fyri, hvør endin fór at vera, og um eg veruliga skuldi yvirliva sjúkuna, sigur Sunneva Dalsgaard.

Mynd: Jens Kristian Vang

- Tað var sum at fáa deyðadóm

– Tá eg fekk staðfest krabbamein í bróstinum, stúrdi eg beinanvegin fyri at missa lívið, sigur Sunneva Dalsgaard, sum mátti fara ígjøgnum eina tíð við iva, ótta og stúran

EYÐUN KLAKSTEIN

Tá Sunneva Dalsgaard fyri góðum tveimum árum síðani kom fram á ein knykil í øðrum bróstinum hjá sær, gjørdi hon skjótt av.

Hon vendi sær alt fyri eitt til læknan hjá sær fyri at fáa kanna hendan knykilin, og tað vísti seg, at talan var um ein krabbasvull, sum mátti skerast burtur.

Knappliga stóð Sunneva í eini fullkomiliga nýggjari støðu, har hon óttaðist fyri sínum egna lívi, og har ivin nívdi í fleiri vikur.

– Eg stúrdi beinanvegin fyri at missa lívið, og tá eg fekk staðfest krabbamein, var tað sum at fáa deyðadóm, greiðir Sunneva frá.

– Tað var ómetaliga hart at fáa boðini um sjúkuna. Eg hugsaði um mannin og børnini, og at eg hevði nógv at liva fyri, og hesar vikurnar, tá eg bíðaði eftir boðum og viðgerð, vóru øðiliga tyngjandi sálarliga.

Læknin óumhugsin

Sjúkrasøgan hjá Sunnevu byrjar í hennara egna heimi.

– Eg havi havt til vana at kanna bróstini hjá mær, og tað var soleiðis, at eg kom fram á knykilin í øðrum bróstinum í apríl 1998, greiðir Sunneva frá.

Hon vendi sær alt fyri eitt til læknan hjá sær, sum síðani sendi hana víðari til kanningar á Landssjúkrahúsinum beinanvegin. Har vísti ein mammografi-kanning, at alt var ikki, sum tað skuldi verða, og Sunneva fekk tí eina tíð hjá skurðlækna, sum skuldi taka sær av henni.

– Eg skuldi sleppa beinanvegin til skurðlækna, men hann gav avboð av eini ella aðari orsøk. Eg kendi meg so ótrygga, at eg stríddist hart fyri at fáa tíð hjá einum øðrum lækna sama dag, og tað eydnaðist mær, sigur Sunneva.

Men viðtalan hjá hesum skurðlæknanum var sum eitt slag í andlitið á henni.

– Hann lat meg sleppa fram at, eftir at hann hevði arbeitt ein heilan dag, og tí var hann kanska eitt sindur troyttur og óumhugsin. Tá hann so hugdi í pappírini hjá mær, tók hann kaldliga til, at hetta sá ikki gott út, og at hetta var helst krabbamein.

– Tað var sum alt raplaði fyri mær, og eg sá meg beinanvegin í eini kistu, greiðir Sunneva frá.

Ræðulig bíðitíð

Vanliga verður fyrst ein kanning gjørd av vevnaðinum, áðrenn sjálv skurðviðgerðin verður gjørd, men umstøðurnar vóru soleiðis, at tað bar ikki til at gera hesa kanning.

Tí avgjørdi læknin at skera hana longu dagin eftir viðtaluna.

Sunneva vildi fyrst hava læknan at taka alt bróstið, men hon lurtaði eftir ráðunum frá læknanum um, at tað var nóg mikið at skera knykil burtur.

Skurðviðgerðin eydnaðist væl, og læknin helt seg hava fingið allan knykil burtur. Nú skuldi knykilin kannast fyri at vita, um talan veruliga var um krabbamein, og úrslitinum av hesi kanning skuldi Sunneva bíða eftir í tvær vikur.

– Bíðitíðin var ræðulig, tí hóast eg hevði fyrireikað meg upp á, at talan var um krabbamein, so var tað ikki endaliga staðfest, sigur Sunneva.

Kundi lopið um hálsin á honum

Tá boðini komu frá kanningini, varð tað so staðfest, at talan veruliga var um krabbamein, og so skuldi hon aftur kannast.

Endamálið við nýggju kanningini var at finna út av, um krabbamein hevði spreitt seg til beinagrindina ella onkran annan part av kroppinum. Aftur gingu tvær vikur, har Sunneva stúrdi fyri úrslitinum av kanningini.

Men hesaferð vóru boðini góð at fáa.

– Læknin ringdi til mín og bað meg koma til viðtalu, áðrenn eg átti, tí hann hevði góð boð til mín. Krabbameinið hevði ikki spreitt seg, og tá eg fekk tey boðini, gjørdist eg ómetaliga glað. Eg kundi havt lopið um hálsin á honum, hóast hann hevði verið rættiliga óstortligur undir fyrstu viðtaluni, sigur Sunneva.

Hóast sjúkan ikki hevði breitt seg, skuldi Sunneva hava stráluviðgerð.

– Fyrst vildi eg ikki hava stráluviðgerðina, tí eg helt, at tað fór einki at hjálpa, men eftir at læknin hevði rátt mær til at taka av tilboðunum, gjørdi eg tað so, sigur hon.

Stráluviðgerðin varð gjørd í Danmark, og tað tók sjey vikur.

– Eg kendi meg ongantíð veruliga sjúka kropsliga, men tað var tungt at fara ígjøgnum hetta tíðarskeið sálarliga. Eg stúrdi nógv fyri, hvør endin fór at vera, og um eg veruliga skuldi yvirliva sjúkuna, men við Guds hjálp og stuðli frá familjuni kom eg ígjøgnum tað.

Greið boð

Síðani stráluviðgerðina hevur Sunneva javnan verið kannað, og allar hesar kanningar hava víst, at Sunneva er frísk.

Kanningar í kjalarvørrinum av sjúkini halda tó fram við jøvnum millumbili næstu árini, og boðini, sum Sunneva hevur til kvinnur, eftir at hon sjálv hevur havt bróstkrabba, eru greið.

– Kvinnur skulu javnan kanna bróstini hjá sær, tí so ber til at staðfesta ein møguligan knykil so skjótt sum gjørligt, og harvið eru møguleikarnir fyri at blíva frískur størstir, sigur hon.

– Tað hevur ivaleyst hjálpt mær væl, at eg tíðliga kom fram á knykilin í bróstinum, og at eg varð skurðviðgjørd innan eina viku frá tí, at eg fór til lækna.

Sunneva er nú við í arbeiðnum hjá Bót fyri Bata, sum er ein bólkur undir Krabbameinsfelagnum. Hesin bólkurin útilokandi arbeiðir við bróstkrabba, og kvinnur, sum fáa staðfest bróstkrabba, kunnu venda sær til hendan bólkin, um tey hava hjálp fyri neyðini, ella um tey vilja í samband við onkran, sum hevur havt sjúkuna.

Ein av teimum er Sunneva Dalsgaard. Hon veit, hvussu tað er at fara fígjøgnum eina slíka sjúkralegu.

Hon kennir óttan fyri at missa lívið, men hon hevur eisini upplivað gleðina við at gerast frísk.

Fleiri fáa bróstkrabba

– Tað fyrsta fólk hugsa, tá tey fáa staðfest krabbamein, er, at nú er deyðin vísur, men soleiðis er tað ikki í veruleikanum, sigur ráðgevandi sjúkrasysturin hjá Krabbameinsfelagnum

– Tað hevur týdning fyri viðgerðina, at krabbasvullurin verður staðfestur so skjótt sum gjørligt, áðrenn hann er vaksin ella hevur spreitt seg, sigur Jansy Gaardlykke.

Mynd: Jens Kristian Vang

EYÐUN KLAKSTEIN

Tilburðirnir av bróstkrabba í Føroyum eru øktir seinnu árini.

Nú fáa okkurt um 20 fólk í miðal staðfest krabbamein í bróstinum hvørt ár, og tað eru serliga kvinnur oman fyri fimti ár, sum fáa hesa sjúku.

Oktober mánaði verður kring allan heimin nýttur til at seta fokus á bróstkrabba, men hóast menningin innan viðgerð hevur verið stór, kann eingin kann vísa á nakra fyribyrging fyri krabbamein í bróstinum.

Ráðgevandi sjúkrasysturin hjá Føroya Felag móti Krabbameini leggur tó kvinnum eina við at kanna síni egnu bróst.

– Tað er umráðandi, at kvinnur kenna síni bróst, so tey merkja, um okkurt óvanligt er í bróstunum. Tað hevur týdning fyri viðgerðina, at krabbasvullurin verður staðfestur so skjótt sum gjørligt, áðrenn hann er vaksin ella hevur spreitt seg, sigur Jansy Gaardlykke.

Øðiligt orð

Í fjør vóru 18 nýggir tilburðir av bróstkrabba, og higartil í ár er talið komið upp á 16.

Kvinnur yvir 50 ár eru mest útsettar fyri at fáa bróstkrabba, men eisini tilburðurnir hjá teimum undir 50 ár økjast í tali. Ein út av hvørjum hundrað, sum fær bróstkrabba, er mannfólk.

Helvtin av teimum, sum fáa krabbamein, gerast frísk, men hetta er ikki tað, sum fólk fyrst hugsa um, tá tey fáa boðini um sjúkuna.

– Krabbamein er eitt øgiliga negativt orð, og tað fyrsta fólk hugsa, tá tey fáa staðfest krabbamein, er, at nú er deyðin vísur. Men í dag er viðgerðin nógv betri enn áður, og helmingurin av sjúklingunum verður frískur, og fólk liva sum heild longri við sjúkuni, vísir Jansy Gaardlykke á.

Sjálvkannan

Í Svøríki hava tey innført skipaðar mammografi-kanningar av bróstunum hjá kvinnum, men hetta verður ikki gjørt í øllum tí danska kongaríkinum.

Sviiar hava sæð ítøkilig úrslit av hesum sokallaðu skanningunum, men tað er kostnaðarmikið at hava slíkar reguligar kanningar av kvinnum, og tað er ein orsøk til, at hetta ikki verður gjørt í Føroyum.

– Fyri tað fyrsta er útgerðin kostnaðarmikil, og so skalt tú hava serkøn fólk at gera hesar kanningar, so tað er ein spurningur um fíggjarliga orku, men sjálvandi hevði tað verið besta loysnin, heldur Jansy Gaardlykke.

– Tá vit ikki hava hesar skanningar, mugu vit mæla kvinnum til at kanna síni egnu bróst eina ferð um mánaðin, og um okkurt óvanligt er at finna í bróstinum, er umráðandi at fara til lækna beinanvegin, sigur hon.

Nógv ringja

Nógv av teimum fólkunum, sum fáa krabbamein, venda sær til Krabbameinsfelagið, og har er tað uppgávan hjá ráðgevandi sjúkrasystrini, sum er einasta starvsfólkið hjá felagnum, at vegleiða fólki.

– Fólk spyrja um ymiskt, tey eru kanska ótrygg við okkurt, sum tey hava fingið at vita, tey vilja hava onkrar praktiskar upplýsingar, og so eru tað summi, sum hava brúk fyri at tosa við meg um okkurt, sum liggur teimum at hjarta, sigur Jansy Gaardlykke

– Vit hava eina fasta telefontíð hvønn dag, og tað eru nógv fólk, sum brúka hetta tilboð. Við hvørt eru tað avvarðandi, sum spyrja seg fyri vegna onkran sum hevur fingið krabbamein,og eg havi eisini til uppgávu at seta sjálvhjálparbólkar saman.

Krabbameinsfelagið veitir fíggjarligan stuðul til krabbameinssjúklingar, og felagið átekur sær eisini ein part av gjaldinum, tá fólk fara til sálarfrøðing. Harumframt letur felagið eisini á ð -

Óvist um sáttmálar

Nevndin í Reiðarafelagnum fyri farmaskip afturvald

Árni Joensen

Hósdagin í farnu viku var aðalfundur í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip. Á aðalfundinum var nevndin afturvald, og í nevndini sita: Árni Joensen, Óli Hammer og Hákun Djurhuus.

Sáttmálarnir við manningarfeløgini ganga út 1. mars 2001, men felagið veit ikki enn, um verandi sáttmálar verða uppsagdir ella ikki. Uppsagnarfreistin er 30. november í ár.

Frálandavnna

Bæði Maskinmeistarafelagið og Føroys Skipara- og Navigatørfelag hava tó boða frá, at tey ynskja at viðgera sáttmálaviðurskiftir í samband við frálandavinnu.

Tann fyrsti fundurin í hesum sambandi var í síðstu viku við Maskinmeistarafelagið, og væntandi verður fundur við Føroys Skipara- og Navigatørfelag í næstum, skrivar Vinnuhúsið.

Ráevnisvinnan avmarkast við loyvum

Seinastu tíðina hevur nógv verið tjakast um, á hvønn hátt samfelagið skal fáa sum mest burturúr loyvisavmarkaðum vinnum

Vinnuhúsið skrivar, at útgangsstøðið er, at upprunaliga vóru loyvini latin einum reiðaríð ella felagið, sum síðani hevur bygt virksemi upp innan fiskiveiðu ella alivinnu. Í Føroyum snýr tjaki seg í støran mun um at avmarka luttøkuna hjá útlendskum feløgum í føroyskum vinnum, sum eru avmarkaðar av loyvum.

Hetta tjak fer ikki bara fram í Føroyum, men eisini í øðrum londum, sum eisini avmarka luttøkuna í ráevnisvinnunum við loyvum. Í Noregi t.d. hevur tjakið um prísin á aliloyvum staði uppá eina tíð. Norska Fiskimálastýrið ætlar at útskriva fleiri aliloyvir í hesum og komandi árum, men orsaka av tjakinum um, á hvønn hátt loyvini skulu koma út á marknaðin, er útskrivingin av loyvum drigin út.

Á uppboðssølu

Norsku vinnufeløgini fingu í seinastu viku at vita frá Fiskimálastýrinum, at aliloyvir skuldu bjóðast út á uppboðssølu í komandi árum

Norsku vinnufeløgini hava ikki gjørt endaligar niðurstøður um uppskotið hjá Fiskimálastýrinum, men tey meta, at tað uttan iva fer at føra til, at loyvini verða keypt av stórum kapitalsterkum fyritøkum, sum longu eru í vinnuni og at tiltakið fer at økja um kapitalkostnaðin í eini vinnu, sum er í harðari altjóða kapping. Vinnufeløgini vísa somuleiðis á, at ein slík skipan vil gera, at norsku myndugleikarnar missa tað ávirkan á strukturin í alivinnuni, sum teir fyrr hava hildið seg til, nevniliga møguleikan at brúka loyvir í útjaðarapolitikkinum.

Hinvegin vísa vinnufeløgini á, at verður tað soleiðis, at alivloyvir verða seld á hvørjum ári komandi árini, vil prísurin fella orska av stóra útboðnum og vil tað merkja, at minni kapitalsterk feløg eisini kunnu verða við í kappingini um aliloyvir.